# Jólaborðið

**Tað er ymiskt, hvat gjørt verður burturúr jólaborðhaldi og borðinum sjálvum. Summi hava vanligu pappírsdúkarnar og restin er kanska eisini pappír og plast, meðan onnur gera meira burturúr**

HUGLEIÐING
*dagfinn@sosialurin.fo*

Pappír og plast. Dúkar, gløs og annað. Alt pappír og plast. Og so ikki meir.

Soleiðis síggja óivað mong jólaborð út.

Men so eru tað tey, ið gera meira burturúr. Livandi ljósini eru nærum ein treyt, men jólahugnin fæst eisini á so mangan annan hátt.

Og fleiri gera eisini nógv burturúr, fyri at hugna um, so umstøðurnar eru so góðar sum gjørligt. Tað er eisini bert hugflogið, ið setur mark, sum í so mongum øðrum viðurskiftum

### Náttúran

Seinnu árini hevur meira og meira verið at sæð til føroysku náttúrina, tá borð verða prýdd. Litríku nissurnar, pappírsbondini, ella hvat nú annars hevur fingist til keyps, er við at fánað, tí ístaðin er náturan komin á borðið. Ikki so at skilja, at ein jólahúgva og eitt hjarta verða, ella skulu verða, skúigvað av borðinum, men í dag tykist rákið loyva meira av greinum, steinum og kanska tara. Eisini til jólaborðhald.

Og ein samanseting av gomlum, siðbundnum og keyptum lutum, ið eru tvinnaðir saman við meira náttúrugivnum tilfari, er eisini meira inn og hetta er prýðilgt.

T.d. er ein grein - ið er nakin á heysti og vetri - og sum er tikin úr einum urtagarði nærhendis, sera vøkur og prýðilig, tá hon er klødd við jólaprýði av ymsum slag, hvørt tað so er keypt glitur, ella okkurt lívrunnið.

Og livandi ljósini nýtast ikki at standa í undirskálum, í silvirpappíri ella vanligum stakum.

T.d. er sera vakurt at hava stór og tjúkk ljós, ið sjálvi standa á borðinum, og so gera soleiðis til, at hvítur sandur verður koyrdur á borði um ljósini. Einfalt og vakurt. Hvíti sandurin fæst í flestu bygdum og býum, men bert skal hann turkast í góðari tíð.

Og farrin av einum kavafølvi fæst á so mangan hátt, um hetta ynskist. Lættast er sjálvsagt at leita á handilshillarnar, at hesin fæst í dós.



### Vøkur borð

Tað er í dag ikki óvanligt at biða fólk prýða stóru jólaborðini. Hetta er eins vanligt í dag, sum tað er at biða kokkar til stóru borðhaldini.

Tí tað er nú eina ferð so, at vit eru so ymisk, og tað eru tey, ið veruliga hava evnini at fáa alt stásiligt og prýðiligt, eisini hóast lítið kanska er at gera burturúr. Ofta kann minni nevniliga gera betri, heldur enn at alt druknar í einum greyti av øllum møguligum lutum og litum, ið ikki høvd ella hali sæst á.

Vit á Sosialinum fara í næstum, tá jólaborðhaldini av álvara nærkast, at fylgja einum av hesum borðprýðarum, tá farið verður undir at gera til, so jólaborðhaldini gerast hugnalig. Tá ber til at fáa hugskot og íblástur.

VEITSLUKLÆÐIR



Skálabúðin
Dr. Jacobsensgøta 21 · Tel. 31 53 15

# Soleiðis er okkara jólaborðhald

**Vit hava vent okkum til nakrar tilvildarligar fyritøkur í Føroyum fyri í fáum orðum at fáa eina frágreiðing um, hvussu tey har á staðnum hava sítt árliga jólaborðhald**

*Ltr: D. Olsen*

### Reyni Service, Hoyvík

*Hava tit jólaborðhald?*

- Ja.

*Eru tit á arbeiðsplássinum ella fara tit út at eta?*

- Vit eta á matstovu og halda síðani á har. Tað er eisini komið fyri, at vit hittast hjá einum starvsfelaga áðrenn farið verður út at eta.

*Hava tit skipað undirhald?*

- Ja, tey seinnu árini hava vit havt tað. T.d. hevur onkur verið í útvarpinum og spælt sær við at gera undirhald.

*Hava tit hesar vælkendu jólapakkarnar til 10 ellla 20 krónur?*

- Ja, vit hava hesar smáu pakkarnar á 5 til 10 krónur, ella hvat teir nú kosta.

*Eru jólaborðhaldini sum heild broytt seinnu árini?*

Ja, tey eru friðaligari. Nú er undirhald og ikki so so óskipað, so bara onkur undirheldur. Sum heild eru borðhaldini meira skipað.

### Poul Hansen, heilsøla, Tórshavn

*Hava tit jólaborðhald?*

Ja

*Eru tit á arbeiðsplássinum ella fara tit út at eta?*

Vit eru her á arbeiðsplássinum.

*Gera tit so nógv burturúr at prýða borðið?*

Ja, vit gera heilt nógv burturúr. Vit byrja á morgni og tað er alt hetta við livandi ljósum, serviettum og hesum sum glitrar og so framvegis.

*Hava tit skipað undirhald?*

Ja, tað hava vit onkutíð. Tað er bæði lokalt og so kann onkur undirhaldari koma upp á tal eisini.

*Hava tit hesar vælkendu jólapakkarnar til 10 ellla 20 krónur?*

- Ja, og jólamann. Vit hava eisini gjørt tað, at vit burturluta millum starvsfólkini, um fyritøkan hevur vunnið okkurt, t.d. eina ferð, á lutaseðli.

*Eru jólaborðhaldini sum heild broytt seinnu árini?*

- Meira verður gjørt burtuur. Maturin er betri. Fólk møta upp og eru væl ílatin, eisini tey ungu. Tað er stuttligt, at so gott sum øll eru við hvørjaferð.

### Norðoya Sparikassi, Klaksvík

*Hava tit jólaborðhald?*

- Ja.

*Eru tit á arbeiðsplássinum ella fara tit út at eta?*

- Vit eru á arbeiðsplássinum.

*Gera tit so nógv burturúr at prýða borðið?*

- Ja, her eru ymisk fólk, bæði til aldurs, kyn og annað, og vit royna at fáa øll at kenna seg væl og fáa eina hugnaliga løtu.

*Hava tit skipað undirhald?*

- Ja, nógv av undirhaldinum verður gjørt her á staðnum. Her eru nógv kreativ fólk, bæði tá tað kemur til sang, tónleik og annað.

*Hava tit hesar vælkendu jólapakkarnar til 10 ellla 20 krónur?*

- Ja, tað hava vit havt í nógv ár.

*Eru jólaborðhaldini sum heild broytt seinnu árini?*

- Ja, meira verður gjørt burturúr hvørt ár. Tá ein heldur, at ein toppar eitt ár, so verður tó roynt at gera tað betri árið eftir. Júst sum við so mongum øðrum viðurskiftum. Og uppmøtingin er góð. Kemur onkur ikki til jólaborðhaldið, so er tað tí tað av onkrari orsøk ikki liggur fyri hjá teimum, tí okkurt annað hevur stungið seg upp.

### Havnarskrivstovan, Tórshavn

*Hava tit jólaborðhald?*

- Ja.

*Eru tit á arbeiðsplássinum ella fara tit út at eta?*

- Tað er sera ymiskt, so tað er bæði.

*Gera tit so nógv burturúr at prýða borðið?*

- Vit gera meria og annað, men ja, vit dekka vakurt borð. Vit eru jú her á arbeiðsplássinum, so vakthavandi kann vera við eisini.

*Hava tit skipað undirhald?*

- Ikki tað vit eru á arbeiðsplássinum og vit eru eisini bara 14 fólk. Men onkutíð fara vit aðrastaðni áðrenn. Vit hava eisini gjørt tað, at vit fara t.d. útferð. Í fjør fóru vit t.d. vestur í Vágarnar og vitjaðu elliskakførini, sum eru á Vatnsoyrum, bit vitjaðu í Gásadali og á flogvøllinum og Hotel Vágum.

*Hava tit hesar vælkendu jólapakkarnar til 10 ellla 20 krónur?*

- Nei

*Eru jólaborðhaldini sum heild broytt seinnu árini?*

- Nú er meira komið afturat. Fyrr vat tað mest tað, at vit hittust til ein gott borðhald á arbeiðsplássinum.

### Tangavirkið, Vágur

*Hava tit jólaborðhald?*

- Ja.

*Eru tit á arbeiðsplássinum ella fara tit út at eta?*

Vit fara út at eta og smiðjan bjóðar ein góðan døgurða. So halda vit fram hjá einum starvsfelaga ella hjá stjóranum.

*Hava tit skipað undirhald?*

Nei, vit tosa um tað, ið er farið, og onkur stuttlig søga er altíð á skránni.

*Hava tit hesar vælkendu jólapakkarnar til 10 ella 20 krónur?*

- Nei, men smiðjan letur eitthvørt til starvsfólki.

*Eru jólaborðhaldini sum heild broytt seinnu árini?*

- Nei, ikki tað stóra. Vit eru nokkso siðbundnir.